52-016/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 016/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Kristinu Háfoss, løgtingsmanni, um møguliga avlurting av føroyskum borgarum og vinnufyritøkum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur danska fregnartænastan atgongd til talgilt samskifti hjá føroyskum borgarum ella føroyskum vinnufyritøkum í Føroyum?

2. Er nøkur fráboðan komin til landsstýrið um ábendingar eru um, at føroyskir borgarar ella vinnufyritøkur í Føroyum hava verið avlurtað?

3. Er partur av teimum avlurtingum, ið danska fregnartænastan hevur latið amerikonsku fregnartænastuni, samskiftisupplýsingar hjá føroyskum borgarum ella vinnufyritøkum?

4. Hvat fekk landsstýrið upplýst frá danska verjumálaráðharranum viðvíkjandi donsku fregnartænastuni og samskiftisupplýsingum hjá føroyskum borgarum og vinnufyritøkum?

5. Hvat fekk landsstýrið upplýst um málið sum heild, tá hetta varð tikið upp á fundi við danska verjumálaráðharran?

6. Hvat ger landsstýrið fyri at tryggja, at føroyskir borgarar og vinnufyritøkur ikki verða avlurtað av donsku fregnartænastuni ella øðrum?

Svar:

Til nr. 1:
Virksemið hjá donsku uttanríkis- og hernaðarfregnartænastuni "Forsvarets Efterretningstjeneste er í Føroyum grundað á § 13 í *Lov om forsvarets mål, opgaver og organisation m.v. :*

*" **13.** Forsvarets Efterretningstjeneste er underlagt og virker under ansvar over for forsvarsministeren.*
Stk. 2. Forsvarets Efterretningstjenestes opgave er at indsamle, bearbejde og formidle informationer om forhold i udlandet af betydning for Danmarks sikkerhed, herunder for danske enheder m.v. i udlandet."

Í Danmark er henda áseting sett úr gildi, og virksemið hjá Forsvarets Efterretningstjeneste er har skipað við lóg nr. 602 om Forsvarets Efterrretningstjeneste frá 2013 (FE-lógin). Henda lóg er ikki sett í gildi fyri Føroyar.

Heldur ikki lógin um *Center for Cybersikkerhed*, ið er nettrygdar- og verjudepilin hjá *Forsvarets Efterretningstjeneste* er galdandi fyri Føroyar.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Til nr. 2:
Landsstýrið hevur ikki fingið nakra fráboðan frá donskum myndugleikum um, at føroyskir borgarar ella vinnufyritøkur í Føroyum hava verið avlurtað.

Til nr. 3 og 4:
Sí svar til spurning. 5.

Til nr. 5:
Spurningar 3, 4 og 5 verða svaraðir undir einum.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum hevur á fundi við danska verjumálaráðharran tann 9. september gjørt vart við, at landsstýrið vil hava neyva kunning, um so er, at føroyingar, føroyskar upplýsingar ella fyritøkur eru partur av áleikandi málinum hjá donsku fregnartænastuni.

Undir fundinum varð kunnað um, at *Tilsynet med Efterretningstjenesterne,* tann 21. august, lat danska verjumálaráðnum eina frágreiðing, ið m.a. var grundað á upplýsingar frá einum ella fleiri varskógvarum. Niðurstøðan í frágreiðingini vísir á viðurskifti í virkseminum hjá FE, sum møguliga ikki eru í samsvari við galdandi lógarverk. Júst hvat talan er um er klassifiserað og verður tí ikki umrøtt ella viðmerkt nærri alment, hóast nógva og umfatandi umrøðu í miðlunum. Leiðandi starvsfólk í FE og danska verjumálaráðnum eru fyribils frítikin fyri tænastu sum avleiðing av frágreiðingini, og nú verður ein umfatandi og óheft kanning sett í verk. Eisini kanningin verður klassifiserað, og helst verður hetta lógarfest til tess at tryggja, at viðbreknar upplýsingar ikki koma út.

Til nr. 6:
Fyri at verja seg fyri avlurting og aðrari njósning arbeiðir landsstýrið miðvíst við at hava so góða og dagforda KT-trygd, sum til ber. Landsstýrið arbeiðir eisini við at upprøðfesta nettrygdina í Føroyum. Harafturat verður arbeitt við mannagongdum í sambandi við viðgerð av viðbreknum upplýsingum og øðrum átøkum, ið hava til endamáls at minka um váðan fyri avlurting. Harumframt er landsstýrið í regluligum samskifti við *Politiets Efterretningstjeneste* um, hvat í vit kunnu gera fyri at verja okkum móti njósning móti føroyskum málum.

Í Tinganesi, 22. september 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður